# B36 leitar sær styrk

**Formaðurin í felagnum vil ikki siga, hvørjar leikarar talan er um, men tað tykist ikki valda ivi um, at fleiri leikarar eru ávegis til felagið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Seinnu árini hevur B36 verið eitt av føroysku feløgunum, sum hampuliga støðugt hevur leitað sær heilt fram móti oddinum. Tey bæði seinnu árini hevur úrslitið verið silvurmerki, og tó at felagið hevur upplivað stóra frágongd, so tykist leiðslan ikki hava ætlanir um at skrúva niður fyri ferðini.

Avtalur eru longu fingnar upp á pláss við Jákup Mikkelsen, Herbert í Lon Jacobsen og – sum vit skrivaðu í gjár – Niclas Niclasen, men framvegis verða fleiri nøvn sett í samband við felagið.

Formaður felagsins, Kristian á Neystabø, vil tó ikki siga nakað um, hvørjir leikarar møguliga eru ávegis til felagið, men hann váttar, at talan helst verður um meira tilgongd enn tað, sum nevnt er omanfyri.

– Hópurin hjá okkum byrjar venjingarnar longu fyrst í november. Enn er tó langt til kappingarbyrjan, men tað er væl møguligt, at fleiri leikarar fara at leggjast afturat teimum, sum nú eru í felagnum, sigur hann.

Nøvn vil formaðurin sjálvandi ikki seta, men tað er helst einki dulsmál, at tað í fleiri førum er heilt nær við, at undirskriftir verða settar á pappírið.

Mikkjal Thomassen hevur áður verið í B36, og tó at tað ikki gekst heilt eftir vild hjá honum á Toftum í fjør, so tykist tað vera víst, at hann fer at spæla í hvíta búnanum komandi ár. Somuleiðis tykist tað vera sannlíkt, at Fróði Benjaminsen er ávegis til B36. Hann hevur í ár spælt við íslendska Fram, men sum skilst, so verður tað ikki har, at hann fer at spæla komandi ár.

Hartil hava teir báðir útlendingarnir, sum í seinnu kappingarhálvu í ár vóru í ÍF, eisini verið settir í samband við B36. Enntá rættiliga álítandi, skilst. Ahmed Sylla og Gunnar B. Nielsen hava í øllum førum havt onkur ørindi í B36-húsinum hesa vikuna, hóast hesar upplýsingar, so bil Kristian á Neystabø einki siga um, hvørt felagið er í ferð við at gera avtalu við teir báðar ella ikki.

*Fróði Benjaminsen er ein av leikarunum, sum sigst vera ávegis til B36*



## Hondbóltsstøður

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 3 | 3 - 0 - 0 | 76 | 60 | 16 | 6 |
| 2 Søljan | 3 | 2 - 0 - 1 | 93 | 67 | 26 | 4 |
| 3 VB | 3 | 2 - 0 - 1 | 83 | 65 | 18 | 4 |
| 4 Neistin | 3 | 2 - 0 - 1 | 81 | 66 | 15 | 4 |
| 5 StÍF | 3 | 1 - 1 - 1 | 74 | 77 | -3 | 3 |
| 6 VÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 73 | 76 | -3 | 2 |
| 7 Kyndil | 3 | 0 - 1 - 2 | 57 | 82 | -25 | 1 |
| 8 Tjaldur | 3 | 0 - 0 - 3 | 64 | 108 | -44 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v - j - t | v. mál | t. mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 3 | 3 - 0 - 0 | 72 | 68 | 4 | 6 |
| 2 Kyndil | 3 | 2 - 0 - 1 | 92 | 70 | 22 | 4 |
| 3 H71 | 2 | 1 - 0 - 1 | 63 | 53 | 10 | 2 |
| 4 KÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 73 | 80 | -7 | 2 |
| 5 StÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 75 | 89 | -14 | 2 |
| 6 Neistin | 2 | 0 - 0 - 2 | 52 | 67 | -15 | 0 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 2 | 2 - 0 | 6 | 1 | 5 | 4 |
| 2 TB | 2 | 2 - 0 | 6 | 1 | 5 | 4 |
| 3 Dráttur | 2 | 1 - 1 | 5 | 4 | 1 | 2 |
| 4 KÍF | 2 | 1 - 1 | 3 | 5 | -2 | 2 |
| 5 ÍF | 2 | 0 - 2 | 2 | 6 | -4 | 0 |
| 6 SÍ | 2 | 0 - 2 | 1 | 6 | -5 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 2 | 2 - 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| 2 Mjølnir | 2 | 2 - 0 | 6 | 1 | 5 | 4 |
| 3 SÍ | 1 | 0 - 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 4 Fram | 1 | 0 - 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 5 ÍF | 2 | 0 - 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

## Dystir um vikuskiftið

| Dagur | Kl. | Dystur | Dómari |
|---|---|---|---|
| **Hondbóltur - Sunset-kappingin** | | | |
| 30.10 | 14.30 | Neistin-Tjaldur | Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen |
| 30.10 | 17.00 | Stjørnan-Søljan | Heri Petersen & Brandur Johannesen |
| 31.10 | 14.30 | Kyndil-VÍF | Kristian Johansen & Sámal Hansen |
| 31.10 | 14.30 | StÍF-VB | Hannis Wardum & Uni Wardum |
| **Atlantic Airways-kappingin** | | | |
| 30.10 | 16.00 | Neistin-KÍF | Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen |
| 31.10 | 16.00 | Kyndil-VÍF | Kristian Johansen & Sámal Hansen |
| 31.10 | 16.00 | StÍF-H71 | Hannis Wardum & Uni Wardum |
| **Flogbóltur - Meistaradeild kvinnur** | | | |
| 30.10 | 14.00 | SÍ-KÍF | TB |
| 31.10 | 14.00 | Mjølnir-Dráttur | SÍ |
| 31.10 | 14.00 | ÍF-TB | KÍF |
| **Meistaradeild menn** | | | |
| 30.10 | 16.00 | SÍ-Fram | Fleyr |
| 31.10 | 16.00 | Mjølnir-Fleyr | ÍF |

# Allir uttan teir í Frem halda fram

**Hjá Frem var tað vónbrot, at teir ikki megnaðu at spæla seg í fjórðingsfinaluna í steypakappingini, meðan lagið var gott í Fremad Amager og Horsens, sum bæði vunnu á feløgum í superliguni**

DANSKA STEYPAKAPPINGIN
*Jóannes Hansen*

Trý feløg, sum hava føroyingar í mansskapinum, eru framvegis partur av donsku steypakappingini, nú bara átta feløg eru eftir. Tey trý eru FCK, Fremad Amager og AC Horsens.

Hjá Fremad Amager var lagið framúr gott mikukvøldið, tá ið teir á heimavøllinum, sum hesa ferð var í Tårnby, høvdu vunnið 3-2 á superligu felagnum FC Nordsjælland.

Einki mál varð skorað í 1. hálvleiki. Fremad Amager legði seg framum, men tað sá einki út, tá ið gestirnir eftir lítlari løtu høvdu skorað tvey mál og harvið vóru á odda 2-1. Fýra minuttir undan leikloki javnaði Fremad Amager, og tað restaði ein minuttur, tá ið teir skoraðu til 3-2. Andrew av Fløtum og Hjalgrím Elttør vóru báðir komnir á vøllin, tá ið Fremad Amager skoraði tvey tey síðstu málini. Andrew kom á vøllin, tá ið tað restaðu nítjan minuttir, og støðan var 1-1, og Hjalgrím Elttør varð settur inn, tá ið tað restaðu trettan minuttir, og støðan var 2-1 til gestirnar.

Sigurin hjá Johan Byrial Hansen og Horsens var móti uppaftur størri mótstøðuliði, enn sigurin hjá Fremad Amager varð vunnin. Horsens hevði vitjan av AaB, sum í mai mánað tapti steypafinaluna móti FCK. Heimaliðið vann 1-0. Hetta var fyrsta tapið hjá AaB í seks dystum, og teir úr Aalborg søgdu seg iðra seg ógvuliga nógv um tapið.

FCK spældi í Parkini móti OB, sum í 2002 vann steypafinaluna móti júst FCK. Mikukvøldið mintust tey undan dystarbyrjan 24 ára gamla mannin, sum sunnudagin doyði, tá ið hann fall tíggju metrar í Parkini. Á vøllinum gekk væl hjá FCK, sum vann 2-1, eftir at tað hevði verið málleyst í steðginum, og eftir at Miti hevði lagt OB framum, tá ið tað restaðu nítjan minuttir. Hjalte Bo Nørregaard javnaði við brotssparki, tá ið tað restaðu fimm minuttir, og innskifti Ole Tobiasen skoraði sigursmálið í 89. minutti.

Álvaro Santos og Zuma vóru í FCK álopinum. Men Álvaro noyddist av vøllinum við skaða í lærkrikanum, tá ið eitt lítið korter var farið. Tá kom Peter Møller inn.

Hjá Jón Róa Jacobsen og Frem gekk ikki so væl. Ebbe Skovdahl var so mikið braneggjaður upp undir dystin, at hann metti tað ikki vera heilt burturvið at rokna við møguleikanum, at Frem kundi spæla seg í finaluna Kristi Himmalferðardag. Tað verður av ongum. Á heimavølli móti Skjold, sum eisini er í næstbestu deildini, tapti Frem 2-0, eftir at støðan í steðginum hevði verið 1-0. Longu í vikuskiftinum fær Frem nýggjan møguleika móti Skjold. Tá fara hesi bæði feløgini í Keypmannahavn at hittast í landskappingini.

Jón Rói Jacobsen var á vøllinum allar 90 minuttirnar. Undan steðginum var hann í miðverjuni. Beinanvegin eftir steðgin varð hann fluttur í álopið. Í 47. minutti stútaði hann dygst upp um málið, og eina ferð seinni var um reppið, at tað eydnaðist einum viðspælara at spæla føroyingin púra blankan, men ein verjuspælari rakk akkurát at steðga ætlanini.

Brøndby er oddalið í landskappingini, og mikukvøldið megnaðu teir í torføra útidystinum í Esbjerg við 1-0 sigri at spæla seg í fjórðingsfinaluna í steypakappingini. Jonas Kamper stútaði einsamalla málið í 1. hálvleiki.

FCM vann 4-1 í Herfølge, og talan var eisini um favorittsigur í Køge, har AGF vann 2-1. Gestirnir hildu seg ikki hava spælt tað, sum teir eiga at megna, men teir vóru ikki kroystir, tí Køge minkaði ikki um munin fyrrenn vanliga leiktíðin var um at vera farin.

Ølstykke vann longu mikudagin seinnapartin 3-1 á heimavølli móti SønderjyskE. At dysturin varð spældur so mikið tíðliga komst av, at einki ljós er kring vøllin í Ølstykke.

Í fjórðingsfinaluni verður spælt soleiðis: Ølstykke-FCM, AC Horsens-AGF, Skjold-Brøndby og Fremad Amager-FCK. Tveir teir fyrru dystirnir eru á skránni 10. november, og tveir teir seinnu eru ásettir at verða spældir 6. mars.



# Omanfyri 50/50

**Føroyska talvlandsliðið hevur undan seinasta umfarinum møguleika at røkka málinum um 50% skoru**

TALV
*Carl Eli Samuelsen sigur frá*

**Mallorka:** Vit vunnu í 13. umfari ein greiðan 3-1 sigur á Paraguay, sum annars vóru styrkismettir ovari enn vit, nevnliga nr. 82 ímóti okkara 87. 130 lond taka lut á talvolympiaduni. Martin Poulsen leikti ein tryggan javnleik ímóti altjóða meistara. Talvið vardi nærum fýra tímar og javnleikurin var ongantið í vanda. Hans Kristian Simonsen bardi seg frá ivasamum byrjanarspæli til vunnið endatalv móti javntsterkum telvara. Kollfirðingurin heldur treiskur fram við góðum úrslitum.

Liðleiðarin Mogens Nielsen vísti Olafi Berg álit og hesum vísti yngsti maðurin á liðnum honum aftur við at vinna á 3. borði. Olaf hevur havt eina heldur ringa kapping, men hevur nú 2 stig av 8 og fær kjansin at betra um skoruna í seinasta umfarinum fríggjadagin. John Rodgaard tók ein skjótan javnleik á 4. borði. 3-1 var eitt megnarúrslit, sum merkir at vit nú eftir trettan umfør hava 26,5 stig, omanfyri 50%, og eru á einum deildum 56. plássi. Tredivu pláss omanfyri styrkismetingina.

Ukraina hevur nærum við vissu tryggjað sær OL-gull. Teir hava 36,5 stig og næstir teimum eru russar við 33,5 stigum. Seinast nakað annað land enn Russland/Sovjet vann OL, var í 1978, tá Ungarn vann. Danir hava einans 27,5 stig og um talvgudinnan Caissa er við okkum, ja so hava vit kjansin at yvirhála danska liðið.

Í 14. og seinasta umfarinum hitta vit fyri fyrstu ferð Ísland í OL-høpi! Teir hava eisini 26,5 stig. Íslendingar hava tríggir stórmeistarar og tríggir altjóða meistarar við sær til Mallorka og væntandi hava teir sterkasta lið á pappírinum í uppgerðini um norðatlantshavið. Vit eru sjálvasagt spentir um uppgávuna. Ísland er kent sum kanska relativt tað sterkasta talvlandið í heiminum og ein javnleikur móti teimum hevði verið ein sensatión. Fyri at fáa 50% skoru skulu vit minst fáa 1,5 stig. Tað er málið. Men realistisk eiga vit heldur ikki at gráta um ein 3-1 ósigur.



*Føroyska talvlandsliðið hevur staðið seg sera væl á Talv-OL, og við einum góðum úrsliti á seinasta leikdegi kunnu okkara menn nú taka seg framum danir*

**Einkultúrslitini innan seinasta umfar:**

| | |
|---|---|
| Martin Poulsen | 4,0 av 10 |
| Hans K. Simonsen | 7,0/11 |
| Olaf Berg | 2,0/8 |
| John Rodgaard | 8,0/11 |
| Eyðun Nolsoe | 3,0/7 |
| Carl Eli N. Samuelsen | 2,5/5 |

# Aftur á slóðina

**Sunnudagin verður aftur talan um toppdyst, tá Mjølnir og Fleyr hittast í bestu mansdeildini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er annars nakað síðani, at soleiðis var, tí meðan Mjølnir støðugt hava hildið fast um sína støðu heilt frammi í oddinum, so hava avrikini hjá Fleyr seinnu árini verið nakað misjøvn.

Nú er tó broytt í so máta. Fleyr hevur byrjað kappingarárið við tveimum sigrum, og tað tykist ikki valda nakar ivi um, at teir aftur vilja hava eitt orð at siga í oddinum. Spurningurin er so, hvørt tað í sjálvum sær er nóg mikið til at basa Mjølni í egnari holu, ella um klaksvíkingarnir hava eitt ov sterkt og ov samanspælt lið, soleiðis at heldur ikki Fleyr fær gjørt nakað við teir enn.

Hin dysturin í mansdeildini verður leygardagin, tá SÍ og Fram hittast. Her er einki at ivast í, at sørvingarnir skulu roknast sum favorittar, og tað er eisini neyðugt hjá teimum við einum sigri nú, skulu teir gera sær nakrar vónir um at fylgja við oddaliðunum báðum.

### Oddurin stendur við

Hjá kvinnunum hevur tað mesta higartil snarað kring Mjølnir og TB. Tey spæla bæði sunnudagin, men longu leygardagin er fyrsti dysturin á skránni. Her hava kvinnurnar hjá SÍ ivaleyst vónir um fyrstu stigini bestu deildini yvirhøvur, tá KÍF kemur á vitjan.

KÍF verður ikki roknað sum eitt av liðunum, sum veruliga skal gera um seg í ár, men stríðs-sigurin á Drátti seinast bar tó boð um styrki og treiskleika. So talan verður á ongan hátt um nakra lætta uppgávu hjá SÍ.

Oddaliðini bæði fara so í eldin sunnudagin, og aftur hesa ferð kann roknast við, at tey fara at fáa fult. Mjølnir skal á heimavølli taka ímóti Drátti, og tað tykist óhugsandi, at Dráttur í hesum dystinum skal reisa seg eftir ósigurin seinast.

TB skal á vitjan á Kambsdali, har ÍF hoyrir heima. Tað er ikki júst dysturin, sum TB hevur bestu royndirnar av, men í ár tykist styrkismunurin tó at vera somikið greiður, at tvørakvinnurnar neyvan fáa teir heilt stóru trupulleikarnar av ÍF kortini.

## Saman-legging nærkast

Sum vit áður hava skrivað, so hevur verið tosað um at gera enn eina roynd, har Sumba og VB skulu leggja feløgini saman.

Nevndirnar báðar hava tosað saman um málið í eina tíð, og í vikuni hava so limafundir verið, har tað hevur verið kannað, hvørt limirnir eisini eru sinnaðir fyri eini samanlegging.

Og tað eru tey eftir øllum at døma. Bæði í Vági og í Sumba hava nevndirnar fingið fullan stuðul, tó at nakrar einstakar treytir eisini fylgdu við stuðlinum. Eitt nú tykist greitt, at feløgini í øllum førum komandi árið fara at halda fast um nøvnini, soleiðis VB hevur liðið í bestu mansdeildini og Sumba í teirri næstbestu. Einamest tí feløgini bæði hava stórar føðingardagar at halda komandi ár.

Í næstum verður farið undir ítøkiligar samráðingar um treytirnar fyri eini ætlaðari samanlegging.

**-jm**


